# Reglugerð
# fyri
# Miðbýarfelagið Biskupstorg

## Innleiðing

Í 2015 tók Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku – sum er eitt samstarv millum Klaksvíkar kommunu og Bústaðir (fyrrv. Húsalánsgrunnurin) – stig til at byggja tann fyrsta bygningin í hjartanum av miðbýnum í Klaksvík, nevndur Biskupstorg. Sí viðfesta kort

Hesin bygningur fevnir um tríggjar hæddir við íalt 30 leiguíbúðum í ymiskum støddum, eina veghædd til matstovu- og handilsvirksemi og eina undirhædd til tøkni og goymsluendamál, bæði hjá íbúðunum og virkseminum í veghæddini.

Sum viðfesta kort vísir, er eitt lutvíst innigirt torg vestan fyri Biskupstorg partur av hesi miðbýarbygging, og tað er hetta torg, ið ætlast at verða karmur um virksemið hjá Miðbýarfelagnum Biskupstorg, sum við hesi reglugerð verður sett á stovn av Klaksvíkar kommunu.

Aðaltankin við hesum er, at heimildin til, vegna kommununa, at taka avgerð um leigumálini í veghæddini í Biskupstorg verður flutt frá kommunalu skipanini til eitt sjálvstøðugt felag: Miðbýarfelagið Biskupstorg.

Harumframt skal felagið, í góðum samstarvi við fyritøkurnar á veghæddini í Biskupstorg, við afturvendandi tiltøkum støðugt skal skapa lív, virksemi, trivnað og hugna í hesum hjartanum av nýggja miðbýnum í Klaksvík, ið skal draga fólk til sín, bæði borgarar og gestir, og soleiðis geva meir lív, virksemi og vitjandi til býin allan og harvið gagna handilslívinum kring býin.

Uppgáva og endamál felagsins er sostatt ikki at hava ognir og skuld, men at brúka sítt know-how og førleikar til, vegna Klaksvíkar kommunu, at umsita og taka avgerð um leigumálini í veghæddini í Biskupstorg og fyriskipa virksemi á miðbýartorginum.

Til tess at geva felagnum hóskandi sjálvstøðugar og frælsar karmar at virka undir, har felagið skal vera ein samskipari og viðspælari hjá bæði handilsvinnu, undirhaldsvinnu, borgarum og kommununi, verður Miðbýarfelagið Biskupstorg bygnaðarliga skipað sum eitt felag.

## § 1
## Navn og heimstaður

Fulla navn felagsins er *Miðbýarfelagið Biskupstorg*, sum eisini kann brúkast í styttum formi, tað veri seg bæði sum *Miðbýarfelagið* ella *Biskupstorg*. Í hesi reglugerð hereftir aloftast nevnt *felagið*.

## § 2
## Endamál

Endamál felagsins er:

- at tryggja eina til eina og hvørja tíð hóskandi samanseting av leigumálum á veghæddini í Biskupstorgi, har viðkomandi handlar og matstovur v.m. eru sínamillum komplementerandi, eins væl og teir geva býnum sum heild eina eyka handilsliga attraktión

- at gera bæði Biskupstorg og býin sum heild attraktivt at vitja, bæði hjá borgarum og gestum, og soleiðis skapa fortreytir fyri fleiri vitjandi og harvið skapa meir lív, virksemi og trivnað – og harvið styrkja og menna grundarlagið undir handilslívinum kring býin allan

- at menna Biskupstorg til at gerast høvuðstorgið fyri býin og kommununa alla, har fólkið savnast til størri og smærri tiltøk, stevnur, hátíðarhald, setanir o.s.fr.

## § 3
## Høvuðsuppgávur

Høvuðsuppgávur felagsins eru:

- at gera, skipa og stjórna leigumálunum í veghæddini í Biskupstorg og í uppat liggjandi bygningum kring sjálvt miðbýartorgið, tá ið hesir eru bygdir
- at skapa støðugt lív, virksemi, trivnað og hugna í hesum hjartanum av nýggja miðbýnum í Klaksvík
- at fremja hetta endamál í góðum samstarvi við fyritøkurnar á veghæddini í Biskupstorg og við atliti til handilslívið í býnum sum heild (tunnilsdagar, vitjanir v.m.)
- at skipa fyri afturvendandi tiltøkum í torginum, so sum torgdagar, marknaðardagar, framførslur o.a.m., sum draga fólk til tín og skapa áhuga fyri Biskupstorgi og býnum sum heild
- at marknaðaføra Biskupstorg, tiltøk og býin sum heild
- at bøta um og støðugt menna umstøðurnar á torginum til uttandura tiltøk v.m. – eitt nú við at útvega og dagføra útgerð, amboð og hentleikar annars á torginum (tjald, ljóð v.m.)
- at arbeiða fyri at draga ymiskt livandi frítíðarvirksemið til torgið, bátahylin og miðbýin annars, so lívið og virksemið har verður so ríkt og livandi, sum møguligt og hóskandi er
- at arbeiða fyri, at torgið verður tað best egnaða og náturliga plássið í kommununi at hýsa móttøkum, hátíðarhaldum, setanum, heiðranum v.m.
- at leggja seg eftir støðugari menning av torginum og miðbýnum sum heild og tí virksemi og teimum møguleikum, torgið kann bjóða, við støðugt at kunna seg um tað nýggjasta á økinum og javnan at samskifta við borgarstjóran um hetta.

## § 4
## Leiðsla

Til at standa fyri leiðsluni og umsitingini av felagnum og at standa fyri og fremja uppgávur felagsins velur borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu eina nevnd við trimum limum, sum verða valdir eftir hvørt býráðsval, galdandi fyri valskeiðið.

Í sínum vali av nevndarlimum skal borgarstjórin leggja seg eftir, at limirnir samanlagt hava allar neyðugar førleika og eginleikar til tess at megna uppgávurnar hjá Miðbýarfelagnum.

Fyrstu ferð verða limirnir valdir fyri restina av inniverandi valskeiði.

Borgarstjórin velur eisini nevndarformannin.

## § 5
## Skipan av nevnd og uppgávum

Umframt formannin, sum borgarstjórin velur, skipar nevndin seg við næstformanni og kassameistara/skrivara og skipar annars sínamillum arbeiðsbýtið.

Eftir tørvi kann nevndin, umvegis borgarstjóran, fáa skrivarahjálp úr býráðsumsitingini.

Hugsanin er, at nevndin skal hava eitt livandi og dynamiskt samstarv og soleiðis skal virka sum eitt toymi undir leiðslu av formanninum.

Eftir tørvi hevur nevndin fundir og samskiftir við borgarstjóran í Klaksvíkar kommunu um yvirskipaði viðurskifti, visjónir, ætlanir og fíggjarlig viðurskifti.

Dentur verður lagdur á, at nevndin, í tann mun hon hevur tørv á tí, hevur eitt gott og tætt samstarv við viðkomandi kommunalar deildir og ger brúk av teimum tænastum, hesar veita.

Nevndin hevur ovastu leiðslu felagsins um hendi og ábyrgdina av fíggjarviðurskiftum tess.

Leiguprísir fyri veghæddina verða ásettir í samráð við eigaran, Klaksvíkar kommunu, sum eisini tekur sær av innkrevjing av leigugjøldum.

Nevndin hevur ábyrgdina av, at felagið verður rikið í samsvari við hesar viðtøkur, og at raksturin verður skipaður eftir skilagóðum umsitingarhátti so bíliga sum tilber.

## § 6
## Samsýningar

Nevndarlimir fáa eina fasta mánaðarliga samsýning á kr. 5.000, meðan nevndarformaðurin fær kr. 8.000.

## § 7
## Nevndarfundir

Nevndarformaðurin kallar inn til nevndarfundir, tá ið hann heldur tað vera neyðugt, ella tá ið nevndarlimur biður um tað.

Nevndin er viðtøkufør, tá ið minst tveir nevndarlimir eru møttir.

Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða formansins (næstformansins, um hin er fráverandi) avgerandi.

## § 8
## Gerðabók

Gerðabók verður førd, sum verður undirskrivað av nevndarlimunum, sum luttóku.

Gerðabókin skal fyri hvønn fundin lýsa í minsta lagi:

a) Hvør ið hevur luttikið
b) Hvør hevði fundarleiðsluna
c) Dagsskránna og avgerðir, ið tiknar verða
d) Hvør hevur ført gerðabókina
e) Nær fundur byrjaði og endaði

## § 9
## Tekningarreglur

Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanninum, sum – í góðum samstarvi við nevndina – í hvørjum einstøkum føri skal tryggja sær, at játtan er tøk til tær útreiðslur, sum settar verða í verk.

Leigusáttmálar viðvíkjandi veghæddini í Biskupstorgi verða tó endaliga undirskrivaðir av borgarstjóranum og kommunustjóranum.

## § 10
## Fíggjarætlan v.m.

Roknskapurin fyri felagið er partur av bókhaldi og roknskapi hjá Klaksvíkar Kommunu, sum verður grannskoðaður av statsautoriseraðum grannskoðara, við rakstrarstaði í kontubólki 1: "Byggi- og býarplansútreiðslur", har útreiðslur og inntøkur í sambandi við veghæddina og miðbýar-torgið annars verða bókaðar.

Nevndin skal í seinasta lagi 3 mánaðir fyri eitt ársskifti gera fíggjarætlan fyri næsta fíggjarár, sum í góðari tíð fyri ársskiftið skal latast kommununi at taka við í sína fíggjarætlanarviðgerð.

Í seinasta lagi innan 4 mánaðir eftir lokið roknskaparár á hvørjum ári, skal nevndin samtykkja eina frágreiðing fyri undanfarna ár, sum verður latin Klaksvíkar kommunu til góðkenningar.

## § 11
## Viðtøkubroytingar og gildiskoma

Hesar viðtøkur og broytingar í teimum fáa gildi, tá ið Klaksvíkar býráð hevur samtykt hesar, og borgarstjórin hevur skrivað undir dagførdu viðtøkurnar.

Henda reglugerð er samtykt samtykt á býráðsfundi hósdagin 21. juni 2018.

***Klaksvík, ___. ___________ - 2018***

***Klaksvíkar kommuna***

***Jógvan Skorheim***
***Borgarstjóri***